LØGTINGIÐ

Til fjølmiðlarnar

Umsitingin

**31. januar 2014**

**Ungdómsting 2014**

Løgtingsformaðurin beyð í august 2013 næmingunum í framhaldsdeild fólkaskúlans at senda inn lógaruppskot ella uppskot til samtyktar at viðgera á Ungdómstinginum, sum verður 10. og 11. februar 2014.

Hesar dagarnar seta næmingarnir sjálvir dagsskránna í Løgtinginum, og hetta er ein frálíkur møguleiki hjá næmingunum at skifta orð um evni, sum teir halda vera týdningarmikil.

Endamálið við Ungdómstinginum er:

- at geva næmingunum størri innlit í fólkaræðið
- at læra næmingarnar at vera ein virknari part av fólkaræðinum
- at vísa næmingunum í praksis, hvussu avgerðarmannagongdir virka í einum fólkaræði
- at geva næmingunum innlit í, hvør leikluturin hjá Løgtinginum er, og hvat arbeiðið hjá Løgtinginum fevnir um

Hetta er fimtu ferð, at ungdómsting verður hildið í Føroyum.

Tá freistin var úti, høvdu 5 skúlaflokkar sent uppskot inn. Avgjørt er, at øll uppskotini koma til viðgerðar á Ungdómstinginum. Uppskotini, ið m.a. fevna um ferðslu, rúsdrekka, skúlan v.m., eru fjølbroytt og áhugaverd.

Luttakandi flokkarnir umboða Tvøroyrar skúla, Eysturskúlan og Venjingarskúlan. Flokkarnir fara hesar báðar dagarnar at manna Ungdómstingið við 33 umboðum. Áhugavert verður at hoyra tey ymisku sjónarmiðini, ið ungdómstinglimirnir fara at leggja fram undir tingviðgerðini.

Skráin fyri Ungdómstingið er løgd og verður send fjølmiðlunum eins og dagsskráin fyri mánadagin 10. februar. Uppskotini kunnu lesast á heimasíðuni hjá Løgtinginum www.logting.fo, har eisini annað tilfar um Ungdómstingið er at finna.

Eins og til vanligar tingfundir kunnu fjølmiðlarnir vera í tingsalinum, meðan ungdómstingfundirnir eru. Tingvarpið sendir eisini frá fundunum.

Týsdagin 11. februar kl. 15.00 er móttøka á skránni, har fjølmiðlarnir hava høvi at hitta ungdómstinglimirnar.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Um tit hava onkur serlig ynski í hesum sambandi, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum á telefon 363900 ella senda ein teldupost til annar@logting.fo

Vinaliga

Anna Rein
fulltrúi